# Hevði rætt at halda lønini aftur

**Tá ið uppsagnartíðin ikki verður vird, fær tað fíggjarligar avleiðingar**

UPPSAGNIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tá ið ein handverkari ikki virðir uppsagnartíðina, hevur meistarin rætt til at halda lønini aftur.

Hetta hevur Føroya Rættur nú staðfest.

Leggjast kann afturat, at dómurin er ikki skotin inn fyri Landsrættin og tí stendur hann við.

Í sáttmálanum millum tey bæði handverkarafeløgini, Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna øðrumegin, og Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag hinumegin, stendur, at tá ið handverkari hevur verið í arbeiði styttri enn tvey ár hjá sama arbeiðsgevara, er uppsagnartíðin fimm dagar. Hevur hann arbeitt longri enn tvey ár hjá sama arbeiðsgevara, er uppsagnartíðin 10 dagar.

Hetta er galdandi fyri báðar partar.

Men verður uppsagnartíðin brotin, skal handverkarin missa fimm ella 10 daglønir. Er tað arbeiðsgevarin, sum brýtur uppsagnartíðina, skal hann hinvegin betala handverkaranum fimm ella 10 daglønir.

À Tvøroyri hendi tað nakað síðani, at ein handverksmeistari helt løn hjá einum handverkara aftur við tí grundgeving, at hann virdi ikki uppsagnartíðina.

Landsfelag Hand-verkarana legði sak ímóti meistaranum, men Landsfelagið tapti. Rætturin sigur, at Landsfelag Handverkaranna hevur ikki prógvað, at tað er vanligt, at handverkarar kunnu siga upp upp á standandi fót, ella at meistarin í veruleikanum hevði góðtikið uppsagnina.

Málið varð nógv viðgjørt í fjølmiðlunum, um tað mundi alt hetta fór fram, sum uppsagnin snúði seg um.

Handverksmeistarin, sum talan var um, er Petur Hammer, men hann ongar viðmerkingar til málið.

Men hann sigur kortini heilt stutt, at sum gamal fótbóltsspælari veit hann, at tá ið farið verður eftir manninum, heldur enn eftir bóltinum, endar oftani galið.



*Uppsagnartíðin skal virðast, annars kostar tað*
*Tilvildarlig mynd*

# Betri skil á ruskplássið

**Vágbingar seta nú eftirlitsmann á ruskplássið**

BURTURKAST
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

**Vágur:** Nú skal betri skil fáast á ruskplássið í Vági. Tað hevur Vágs Býráð samtykt.

Higartil hevur bingjuplássið í Vági, har tað ber til hjá húsarhaldum at sleppa av við burturkast, verið opið altíð.

Men, sum so manga aðrastaðni, verða reglurnar um burturkast ikki virdar í Vági og avleiðingin av tí er, at rusk verður tveitt burtur, sum best ber til.Tað sum brennur fer í bingjuna við burturkasti, sum ikki brennur og øvugt. Fyri ikki um at tala alt tað, sum bara verður tveitt niðurvið bingjunum.

Á býráðsfundi herfyri samtykti Vágs Býráð at fáa eina enda á hesum.

Í fyrra lagi skal ein eftirlitsmaður setast á bingjuplássið.

Í øðrum lagi skal bingjuplássið hava opið fastar tíðir.

Tá ið plássið er opið, skal so eftirlitsmaðurin verða til staðar at leiðbeina fólki, hvar hetta ymiska ruskið skal beinast og yvirhøvur skal hann hava eftirlit við plássinum og at onki verður tveitt niðurvið bingjunum og at rusk ikki kemur á plássið, sum eigur at verða burturbeint aðrar vegir.

Hereftir verður bingjuplássið í Vági opið mánadag, mikudag og hósdag frá klokkan 14-18. Týsdag verður stongt, men fríggjadag verður opið frá klokkan 14-20 og leygardag frá klokkan 14 til 19.



*Vágbingar vilja nú hava betri skil á ruskplássið og tí seta teir nú fólk at hava eftirlit við tí*

# Nú skal vera liðugt við at trilva í blindum

**Føroyingar og grønlendingar mugu fáa allar upplýsingar um Føroyar og Grønland á borðið frá danska fíggjareftirlitinum, siga fólkatingsmenninir í Norðuratlantsbólkinum**

INNLIT
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

So leingi føroyingar og grønlendingar ikki hava fulla atgongd til teir upplýsingar sum danska Fíggjareftirlitið savnar saman um fíggingarstovnar í Føroyum og Grønlandi, ber heldur ikki til at hava tað neyðuga tamarhaldið á fíggjarligu gongdini.

Tað halda teir tríggir fólkatingslimirnir í Norðuratlantsbólkinum, Tórbjørn Jacobsen, Kuupik Kleist og Lars-Emil Johansen.

Teir tríggir hava nú lagt uppskot fyri Fólkatingið um at broyta lógina so at Føroyar og Grønland frá allar upplýsingar, sum fíggjareftirlitið savnar saman um ávikavist føroysku og grønlendsku peningastovnarnar.

Samstundis biðja teir Fólkatingið um at áleggja donsku stjørnini at taka upp samráðingar við landsstýrini í Føroyum og í Grønlandi um, hvussu hesir upplýsingarnir kunnu útvegast.



*Tórbjørn Jacobsen, fólkatingsmaður vil hava, at føroyingar og grønlendingar skulu fáa somu upplýsingar um fíggingarstovnarnar í Føroyum og Grønlandi, sum danir fáa*

### Trilva í blindum

Teir tríggir siga, at av tí, at føroyingar og greønlendingar ikki hava atgongd til teir upplýsingar, sum fíggjareftirlitið fær um peningastovnarnar í hesum londunum, ber tað heldur ikki til hjá hesum londunum at hava so gott innlit í búskaparligu støðuna, sum krevst fyri at kunna ávirka gongdina og fyri at kunna taka neyðug stig fyri at tryggja búskapin.

Teir minna á, at í sambandi við kreppuna í Føroyum fyrst í nítiárunum, varð funnist at landsstýrinum fyri ikki at hava byrgt upp fyri kreppuni.

Hinvegin hevur landsstýriðført fram, at tað hevur ikki tey neyðugu amboðini, sum skuldu til, fyri at stýra fíggjarligu gongdini í einum samfelagi.

Í hesum sambandi varð serliga sipað til frágreiðingarnar frá fíggjareftirlitinum.

– Men hóast landsstýrið hevur gjørt vart við sína misnøgd við støðuna, hevur danska stjørnin ongi stig tikið fyri at tryggja føroyingum upplýsingarnar frá fíggjareftirlitinum.

– Teir tríggir fólkatingslimirnir siga, at hetta gongur ikki longur, serliga ikki nú gongdin er tann, at føroyingar í størri og størri mun taka ábyrgdina av egnum viðurskiftum, eins og rákið í Grønlandi er tað sama

– Tí er tað eisini natúrligt, at føroyingar og grønlendingar fáa somu upplýsingarnar um fíggingarstovnarnar í hesum báðum londunum, sum danir fáa, siga Tórbjørn Jacobsen, Kuupik Kleist og Lars-Emil Johansen.

# Øll kunnu ikki verða professarar – onkur noyðist at taka hond í okkurt

**Frithleit Olsen, stjóri á maskinverkstaðnum, FJM í Runavík, heldur tað vera ein sorgarleik, at landsstýrið í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2004 enn einaferð mælir til at skerja lærlingaendurgjaldið. - Vit hava 14 lærlingar, og fyri okkum merkir lækkingin, sum kom fyrst í hesum árinum og fráboðaða lækkingin fyri komandi ár, eina meirútreiðslu uppá 700.000 krónur í fýra ár. Hetta hongur slett ikki saman við ætlanunum um at útbyggja Tekniska Skúla fyri nógvar miljónir, sigur hann**

LÆRLINGA-VIÐURSKIFTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg fyri 2004 verður sagt, at landsstýrið fer at leggja uppskot fyri tingið í heyst um at skerja endurgjaldið til læruplláss, meðan lærlingur er í skúla, úr 75% niður í 50%.

Hetta er sostatt aðru ferð í eitt ár, at endurgjaldið verður skert. 1. januar í ár lækkaði endurgjaldið úr 100% niður í 75%, og nú fer landsstýrið so at mæla til, at endurgjaldið lækkar heilt niður í 50%.

### Sorgarleikur

- Hetta er ikki minni enn ein sorgarleikur fyri handverksvinnuna, sigur stjórin á maskinverkstaðnum, FJM í Runavík, Frithleif Olsen.

Hann sigur, at teir hava 14 lærlingar og við lækkingini í endurgjaldinum fyrst í hesum árinum og lækkingini aftrat, sum nú er fráboðað, verður meirútreiðslan av 14 lærlingum í lærutíðini heilar 700.000 krónur.

- Útrokningar siga nevniliga, at hvør lærlingur verður 50.000 krónur dýrari við hesum báðum skerjungunum.

Frithleif vísir á, at tað eru mong virki, sum aftra seg við at taka fleiri lærlingar, og hann væntar, at virkini fara at aftra seg uppaftur meira, nú lærlingaendurgjaldið enn einaferð verður skert.

- Tað eru tey, sum halda, at virkini tjena nógv uppá lærlingarnar, tí hesir ikki fáa ta heilt stóru lønina, men hetta er ikki so. Fysta árið fært tú lutfalsliga lítið burtur úr einum lærlingi, og vit skulu ikki gloyma, at ein lærlingur eisini fær løn í frítíðini.

Stjórin sigur, at ein lærlingur er í skúla í meira enn eitt heilt ár í lærutíðini, og hann hevur frí tað mesta av einum hálvum ári.

- Tað, sum hetta snýr seg um, er, at vit hava goldið lærlingunum løn, meðan teir eru í skúla. Síðan hava vit fingið hendan partin av lønin endurgoldnan úr landskassanum sum lærlingaendurgjald. Nú verður hetta endurgjald so skert enn einaferð í eitt ár - fyrst við 25% og sambært ætlaða uppskotinum nú aftur við 25%.



*- Tað er lítil samanhangur í at útbyggja Tekniska Skúla, tí umstøðurnar á skúlanum eru ov vánaligar - samstundis, sum lærlingaendurgjaldið verður so nógv skert, sigur Frithleif Olsen, stjóri á maskinverkstaðnum, FJM í Runavík.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Katastrofa

Frithleif heldur, at hetta er ikki minni enn ein katastrofa, sum hann tekur til.

- Tað er lítil samanhangur í at skerja lærlingaendurgjaldið, samstundis sum Tekniski Skúli skal útbyggjast fyri nógvar miljónir, tí umstøðurnar á skúlanum eru ov vánaligar. Landsstýrið sigur, at útbyggingin av skúlanum er útreiðsluneutral, tí landsstýrið samstundis lækkar lærlingaendurgjaldið. Sæð í ljósinum av hesum, kunnu vit siga, at tað eru virkini sum fíggja útbyggingina av Tekniska Skúla.

Stjórin er stórliga í iva um, hvussu neyðugt tað er at útbyggja skúlan, tá ið landsstýrið samstundis skerjir lærlingaendurgjaldið.

- Sambært Vinnuhúsinum eru færri lærlingasáttmálar gjørdir í ár, og vandi er fyri, at hesir verða enn færri, nú endurgjaldið aftur verður skert.

Frithleif heldur, at hetta er ein syrgilig gongd fyri handverksvinnuna.

- Tað eru ikki øll, sum bókliga eru líka væl fyri. Kortini kunnu hesi vera av bestu handverkarum. Sjálvandi skulu vit hava væl útbúgvið fólk, men øll kunnu ikki gerast professarar. Jú, størri lærdómur - tess minni verður gjørt við hendrunum. Og onkur skal taka hond í okkurt. Tað kann ikki vera rætt, at vit í Føroyum skulu noyðast at innflyta fólk at arbeiða fyri okkum, sigur stjórin á FJM, Frithleif Olsen.

# Landsstýrið leggur upp til færri lærlingasáttmálar

**- Tá ið tað gongur verri við búskapinum, átti landsstýrið at latið endurgjaldið til læruplláss verið óbroytt, heldur vinnan**

LÆRLINGA-VIÐURSKIFTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum er grein um lærlingaviðurskiftini, nú landsstýrið á øðrum sinni leggur upp til at skerja endurgjaldið til læruplláss.

Í greinini verður víst á, at samanlagt fyri allar lærlingar, eru 22 færri lærusáttmálar gjørdir higartil i ár.

- Fyri handverksvinnuna minkaði tilgongdin í 2002 í mun til árið fyri úr 230 nýggjum sáttmálum niður í 212 sáttmálar.

### Óbroytt endurgjald

Víst verður á, at við búskapargongdini og ótryggu karmunum, sum landsstýrið við hesum skerjingum bjóðar vinnuni, er væntandi, at tilgongdin av lærlingum fer at minka uppaftur meira.

- Tá ið tað gongur verri við búskapinum, átti landsstýrið at latið endurgjaldið verið óbroytt.

Sagt verður, at við núverandi gongd, økir landsstýrið um vandan fyri, at færri lærlingar fáa læruplláss.

- Vinnan mælir tískil landsstýrinum til ikki at lækka endurgjaldið til læruplláss enn einaferð, sigur Vinnuhúsið í greinini.

*Gongst, sum spátt verður, nú landsstýrið enn einaferð skerjir endurgjaldið til læruplláss, verða færri og færri lærlingar at síggja á verkstøðunum kring landið*

